## – Eingin legenda

Fótbóltsserfrøðingar og -fjepparar kring allan heim rokna hann sum heimsins besta fótbóltsspælara nakrantíð, men sjálvur heldur argentinski FC Barcelona-spælarin, Lionel Messi, at hann má vinna HM, áðrenn tað kann koma upp á tal. – Fyri at gerast ein legenda og fyri at vera ein fantastiskur spælari, mást tú eisini vera heimsmeistari, sigur Messi, sum síðstu fimm dystirnar hevur skotið 11 mál.



## Messi og teir betri

Fyrrverandi danska fótbóltsstjørnan, Michael Laudrup, heldur núverandi liðið hjá FC Barcelona vera betri enn liðið hjá felagnum, hann sjálvur var partur av í 90-unum. Tá var Laudrup við til at vinna Europa Cup eina ferð og fýra meistaraheiti á rað, men Messi og teir imponera hann: – Vit vóru teir fyrstu, ið vunnu nógv, men Messi og teir eru besta FC Barcelonaliðið nakrantíð, sigur Michael Laudrup.



– Nøkur fólk verða kanska nokk so kedd av tí, at eg skal svimja fyri Danmark, men tað má eg bara taka, sum tað kemur. Hetta er mín stóri dreymur, og eg má bara liva við, at er fyri Danmark, sigur Pál Joensen

Mynd: Álvur Haraldsen

# Nú fái eg av at vita

**– Skal eg fylgja dreyminum um at koma til OL, kann tað bara vera upp á henda mátan. Eg má so bara liva við, at tað er fyri Danmark, sjálvt um eg helst komi at hoyra fyri tað, sigur Pál Joensen, sum ætlar sær til OL í London um tvey ár – men bara kann gera tað undir donskum flaggi**



einsliting@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Nú ÍSF og Svimjisambandið hava fingið avtalu í lag við danska ítróttarsambandið, danska svimjisambandið, altjóða olympisku nevndina og altjóða svimjisambandið um, at føroyskir svimjarar kunnu umboða Danmark á olympiskum leikum, kann Pál Joensen sleppa til OL í London í 2012, um hann annars klárar kravtíðirnar.

– OL er tað allarstørsta fyri ein svimjara, og tað er kappingin, sum øll satsa uppá. Eisini fyri meg er tað størsta at koma til OL, so nú kann eg endiliga hava tað sum eitt mál, sigur Pál Joensen, ið sær tað sum ein ordiligan lætta, at sleppast kann undan karantenuni, ið fyri hann vildi merkt, at hann ikki kundi svomið altjóða kappingar fyri Føroyar í eitt ár áðrenn og eitt ár aftan á OL.

– Henda loysnin ger, at eg havi sama møguleika sum onnur, tí tað havi eg ikki havt frammanundan. Eg havi verið niðan fyri ta gomlu kravtíðina til OL, so fyri meg er OL í London í 2012 nú ein realistiskur møguleiki, eg kann fara eftir.

### Undir danskt flagg

Føroyar hava altjóða limaskap í altjóða svimjisambandinum, FINA, so til allar kappingar undir FINA er Pál Joensen við sum føroyskur svimjari og umboðar Føroyar. Men olympisku leikirnir eru ikki undir FINA, so av tí at Føroyar enn ikki hava fingið olympiska viðurkenning, kann Pál ikki fara til OL sum føroyskt umboð, men bara undir donskum flaggi.

– Fyri meg er tað altíð nógv tað størsta, at eg kann umboða Føroyar í altjóða kappingum. Men í OL ber tað tíverri ikki til, so skal eg við til størstu kappingina av øllum, má tað vera sum partur av danska landsliðnum. Hitt er ikki ein realistiskur møguleiki nú, so eg má bara vera glaður fyri tað, eg kann fáa, sigur Pál Joensen, ið viðgongur, at hann kanska onkuntíð fyrr hevur verið nakað avgjørdur, tá tað hevur snúð seg um at svimja undir donskum flaggi.

– Nøkur fólk verða kanska nokk so kedd av tí, at eg skal svimja fyri Danmark, men tað má eg bara taka, sum tað kemur, sjálvt um eg komi at hoyra fyri tað. Hetta er mín stóri dreymur, og eg má bara liva við, at tað er fyri Danmark. Men vónandi fái eg smoygt Merkið inn ímillum onkrastaðni.

Pál Joensen sigur seg somuleiðis vóna, at hann í OL-høpi kann gerast eitt jarnbrot fyri føroyskari olympiskari viðkenning, og hann vónar, at henda nýggja loysnin ikki ger, at arbeiði við at vinna Føroyum olympiska viðurkenning steðgar.

## Talv rýmir undan flogbólti

**Av tí at triði og avgerandi finaludysturin í mansflogbólti er á Giljanesi leygardagin, er FM-kappingin í talvi fyri einstaklingar útsett nakrar tímar, so sleppast kann undan tí ringasta av flogbóltsganginum**

Leygardagin byrjar FM-kappingin fyri einstaklingar í talvi, og hon verður í fimleikarhøllini á Giljanesi til páskaaftan, 3. apríl. Men av tí at triðja og avgerandi FM-finalan millum menninar hjá SÍ og Mjølnir er í ítróttarhøllini á Giljanesi leygardagin klokkan 15.30, er byrjanin av talvkappingini útsett í fýra tímar.

– Í sambandi við flogbóltsfinalurnar verður helst eitt sindur av gangi og vási, so við at útseta telvingina eitt sindur, ber helst betur til at fáa frið, tá telvararnir fara í gongd, sigur Jógvan Joensen, formaður í Talvsambandinum.

Allar hinar dagarnar byrja telvararnir klokkan 14, men leygardagin verður klokkan 18, áðrenn teir setast við borðini. Og kanska gongur ein løta aftrat, áðrenn teir ordiliga koma í gongd, um tað vísir seg, at flogbólturin framvegis kann órógva tá.

Tað er Sandavágs Talvfelag, sum er vertur fyri kappingini, ið tilsamans telur nígggju umfør. Allar dagarnar er eitt umfar á skránni klokkan 14, uttan mánadagin, tá dupultumfar er á skránni og byrjað verður ávikavist klokkan 10 og 16.

Teir, sum eru við í landsliðsbólkinum, har føroyameistaraheitið í talvi er at kappast um, eru 10 teir hægst styrkismettu telvararnir. Teir næstu 10 eru við í 1. bólki, og so er restin í almenna bólkinum. Unglingarnir telva somu tíðir sum teir vaksnu, og har verður bestu telvarin eisini føroyameistari.

Dómari í kappingini verður IA Mogens Nielsen.

hil